LM-104/2020

fylgiskjal 7

TJÓÐSAVNIÐ

Umhvørvis- og vinnumálaráðið
Gongin 7, Postrúm 377
110 Tórshavn postsmogur

Hoyvík 26 januar 2021
J.nr.: 21/00003-2
Málsviðgeri: JH

Viðmerkingar til Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

Fuglaveiðulógin loyvir í verandi líki (sambært §21 og Kunngerð nr. 120 frá 21. november 1986 um serliga fuglaveiðu) veiðu av grágás. Loyvið til tílíka veiðu er tó treyta av, at talan er um vitskapligt ella almennyttugt endamál. Hóast størri parturin av uppskotinum tískil tykist óneyðugur verður tikið undir við, at tørvur er á at strika "v.m."

Sum heild eru grundgevingarnar fyri lógarbroytingini, eins og í 2013 og 2016, ikki nøktandi. Uppáhaldið um fíggjarligan miss orsaka av grágás er framvegis ikki skjalprógvað.

Í Almennu viðmerkingunum verður lagt upp til, at ongar kanningar og vísindaligt arbeiði er farið fram í samband við grágæs. Hetta er als ikki rætt. Helga Bára Mohr Vang hevur granskað grágásina og ávirkan á bøin. Hon hevur latið úr hondum:

Vang, H. B. M. (2014). *Faroese Greylag Goose: Population status and effects on Faroese agriculture*. Aarhus University.

Vang, H. B. M. (2014). *Føroyska grágásin: Stovnsmeting og ávirkan á føroyskan landbúnað*.

Vang, H. B. M., & Jensen, J.-K. (2016). Changes in Greylag Goose population management in the Faroe Islands. *GooseNews*, *15*, 8–10.

Viðvíkjandi kanningini sum varð gjørd saman við m.a. Búnaðarstovuni verður skrivað
"It is important to stress that it cannot be concluded that goose grazing is exclusively responsible for the observed differences between exclosures and control plots, ..."

Og
"Ein lógarbroytin á vári í 2014 hevur gjørt tað møguligt hjá jarðeigarum, sum kunnu ávísa til beinleiðis skaða vegna grágás, at nýta skjóting til at styggja gás av bøðnum. Um hetta er tann skilabesta loysnin til at loysa trupuleikan hjá jørðeigarunum, er ivasamt."

Og
"A management plan for the Faroese Greylag Goose, that combines the aims of maintaining a sustainable goose population and minimizing adverse effects on agriculture, is long overdue."

Harumframt hava teljingar verið framdar av grágásastovninum í fleiri umførum. Neyðugt er tó at undirstrika, at tað ber ikki til, at seta eina játtan av nú og tá, til at útgreina hvørt ein veiða er burðardygg ella ikki. Hetta er arbeiði ið má liggja í einari fastari legu.

Í Kapittli 2. verða millumtjóðasáttmálar á økjunum nevndir. Staðfest verður, at grágásaveiða "... *er ikki í sjálvum sær í stríð við hesar bindingar, men tað er treytað av, at talan er um burðardygga veiðu.*" Hetta er samstundis rætt og villeiðandi. Tí grágásaveiðan ið talan er um, er ikki burðardygg so leingi vit ikki hava eina greiðari mynd av veiðutrýsti og stovnsstødd. Harumframt vildi eg mett, at tær nógv lamskotnu grágæsnar, sum vera sæddar eru í stríð við bæði millumtjóðasáttmálar og Djóravælferðarlógina.

Vinarlig heilsan

Leivur Janus Hansen

TJÓÐSAVNIÐ | FAROE ISLANDS NATIONAL MUSEUM NATURE AND CULTURE
Kúrdalsvegur 15 Hoyvík | Postsmoga 1155 | FO-110 Tórshavn | FAROE ISLANDS | Tel: +298 340 500 | savn.fo | savn @ savn.fo